

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 04 - 2013

# Skansi Offshore nýggja býarmyndin í høvuðsstaðnum

Skansar eru verjuvirki, sum skulu verja íbúgvararnar móti óynsktum gestum. Soleiðis var tað eisini í forðum, tá Skansin í Havn vardi borgararnar móti óynsktum fremmandafólki. Nú hevur høvuðsstaðurin fingið enn ein skansa, ið liggur skamt frá verandi skansa. Hesin skansin hevur tó eina aðra uppgávu. Hon er at lata dyr upp og útvega býnum og landinum nýggjar inntøkur. Talan er um Skansi Offshore, sum skal vera við til at seta føroyska høvuðsstaðin á "offshore" heimskortið. Við ikki færri enn fimm frálandaskipum fer Skansi Offshore av álvara at gera Havnina til ein av komandi varðunum í oljuvinnuni. Ein skansi og annar. Soleiðis tók onkur av gestunum til á móttøkuni hjá Skansi Offshore, tá fyrrverandi lorvíksreiðarríið lat dyrnar upp fyri almenninginum í høvuðsstaðnum mikudagin. Og rætt hevur hann, tí nýggi skansin í Havn fer at seta síni fingramerki á landsins størstu kommunu. Fríggjadagin vórðu dyrnar so latnar upp á Skansavegi 7, har frálandafyritøkan heldur til. Og oljan.fo var eisini á staðnum. Sí myndafrásøgn frá tiltakinum her á portalinum.